# Frágreiðing og tilmæli um viðgongu- og burðarskipan umframt ljósmøðraskipan í Føroyum



**November 2005**

# Innihaldsyvirlit

**Inngangur** ... 2

**Hvussu skal ein viðgongu- og burðarskipan verða fyri barnakonur í Føroyum** ... 4
**Tíðin áðrenn føðing** ... 5
Viðtaluskrá ... 5
Ultraljóðskanning ... 5
Barnakonur við fysiskum trupulleikum vegna barnsburð ... 5
Roykjandi barnakonur ... 5
Ressursuveikar barnakonur ... 5
Føðingarfyrireiking ... 6
Innlagdar barnakonur ... 6
**Føðingartíðarskeiðið** ... 6
Føðing á sjúkrahúsi ... 7
Heimaføðing ... 7
**Tíðin eftir føðing** ... 7
Grundleggjandi røkt og eygleiðing ... 7
Bróstageving ... 7
Barsilsfimleikur ... 7
Læknakanning ... 7
Eftirføðingarkanning og samrøða ... 8
Burðarumsorgan í sambandi við heimaføðing og og ambulanta føðing ... 8
Stuðul frá teimum nærmastu ... 8
**Góðskutrygging av viðgongu og burðarskipan** ... 8
Truplir føðslar ... 8
Skiftisskipan ... 8
Evnisdagur/ráðstevna hvørt hálvár ... 9
**Føðingarstøð í Føroyum** ... 9
Grundgevingar hjá ljósmøðrum fyri føðingarstøð í Føroyum ... 9
Grundgevingar hjá Steintóru Samuelsen, yvirlækna fyri føðingarstøð í Føroyum ... 10

**Hvussu skal ljósmøðraskipanin verða organisera í heilsuverkinum** ... 10
**Framtíðar ljósmøðraskipan** ... 12
Broyttar fortreytir ... 12
Leiðsluspurningurin ... 12
Tilmæli frá ljósmøðrunum í bólkinum ... 13
Tillaðingar ... 13
**Viðmerkingar til tilmæli frá ljómøðrunum** ... 14

**Hvussu skal ljósmøðraskipanin verða samskipað við aðrar fakfólkar í heilsuverkinum fyri at viðgongu- og burðarskipanin kemur at virka nøktandi og á skynsamasta hátt í Føroyum** ... 14

***Fylgiskjal 1: Sundhedstyrelsens anbefaling og opfordring om at spædbørn ammes fuldt ud til 6 måneder.***
***Fylgiskjal 2: Modermælkens unikke indholdsstoffer.***
***Fylgiskjal 3: Nationale kriterier for spædbarnsvenlige sygehuse.***

# Inngangur

Áðrenn 1983 arbeiddu ljósmøður sum fylkisljósmøður, settar sum danskir tænanstumenn av ríkisumboðnum. Sostatt var eingin ljósmóður sett á sjúkrahúsunum, men tær arbeiddu sjálvstøðugt undir eftirliti av landslæknanum.

Í 1983 varð tikin avgerð um at leggja táverandi ljósmøðraskipan undir sjúkrahúsverkið. Táverandi leiðari fyri ljósmøðraskipanina, varð sett við sjúkrahúsverkið við beinleiðis tilvísing til Sjúkrahússtjóran, sum tá var stjóri fyri øll trý sjúkrahúsini.

Tá ið leiðandi ljósmóðurin á sumri 1999 fór frá, varð avgjørt, at endurskoðað starvið sum leiðandi ljósmóðir innan sjúkrahúsverkið. Táverandi sjúkrahúsleiðarin á Landssjúkrahúsinum, metti, at starvið átti at verið niðurlagt, tí Landssjúkrahúsið hevði nokk við eini yvirljósmóðir. Leiðandi ljósmóðurin er í dag sett av Almanna- og heilsumálaráðnum og lønt av Landssjúkrahúsinum.

Avgjørt varð at seta ein arbeiðsbólk at gera eitt uppskot um, hvat skuldi gerast við starvið. Tríggjar ljósmøður frá Ljósmøðrafelagnum, umframt ein fulltrúi og táverandi aðalstjórin í Almanna- og heilsumálaráðnum mannaðu arbeiðsbólkin.

Munurin á uppfatanini millum partarnar longu á fyrsta fundi var rættuliga klárur. Ljósmøðurnar ynsktu at fáa eina leiðandi ljósmóðir, ið hevði umsitingarligar uppgávur fyri allar ljósmøður í Føroyum og hava sæti uttanfyri sjúkrahúsverkið við beinleiðis tilvísing til Almanna- og heilsumálaráðið.

Táverandi aðalstjórin, metti ikki, at tað var gjørligt, so leingi ljósmøðraskipanin var undir sjúkrahúsverkinum, at ein persónur uttanfyri sjúkrahúsverkið kundi hava umsitingarliga heimild yvirfyri starvsfólkum, sum sett vóru inni á sjúkrahúsunum. Aðalstjórin metti ei heldur, at tær uppgávurnar, sum ljósmøðurnar høvdu víst á, vóru nóg nógvar til at gera eina nýggja funktión uttanfyri sjúkrahúsverkið. Tikið varð undir við, at ein leiðandi ljósmóðir á Landssjúkrahúsinum, møguliga kundi hava eina fakliga ráðgevarafunktión fyri ljósmøðrayrkið í øllum Føroyum, og tá kundi hon verða sett inni á Landssjúkrahúsinum. Annars avvísti aðalstjórin, at ein leiðandi ljósmóðir skuldi vísa til Almanna- og heilsumálaráðið.

Ljósmøðrafelagið var sera ónøgt við arbeiðið í arbeiðsbólkinum, tí tær metti ikki, at arbeiðsbólkurin, sum upprunaliga ætla, endurskoðaði føroysku ljósmøðraskipanina, men í størri mun arbeiddi við at orða eina starvslýsing í sambandi við at søkjast skuldi eftir eini leiðandi ljósmóðir fyri tí fráfarandi. Í hesum sambandi var eisini stór ósemja um organisatorisku plaseringina. Arbeiðið í arbeiðsbólkinum steðgaði upp, men Almanna- og heilsumálaráðið gjørdi eitt uppskot til starvslýsing har starvið skuldi setast á Landssjúkrahúsinum, undir kirurgisku depilsleiðsluni. Hetta uppskotið varð vrakað av ljósmøðrunum, sum mettu at rættast var at leiðandi ljósmóðurin organisatoriskt bleiv sett undir Almanna- og heilsumálaráðnum við tilvísing til aðalstjóran og at talan bleiv um eina ljósmøðraskipan fyri alt landið.

Í juni 2000 legði aðalstjórin málið um leiðandi ljósmóðir inn á Landssjúkrahúsið til avgreiðslu. Síðani tá hevur tað verið nógv samskifti aftur og fram millum aðalráðið, Landssjúkrahúsið og Ljósmøðrafelagið, og er í hesum tíðarskeiði fyribilssetanin av leiðandi ljósmóður fleiri ferðir longd,

men ongin loysn er funnin á hvar leiðandi ljósmóðurin skal setast og hvussu ljósmøðraskipanin skal verða skipað í Føroyum. Ljósmøðrafelagið vendi sær eisini til sakførara, tí tær metti, at um tann leiðandi ljósmóðurin bleiv sett undir depilsleiðsluna á Landssjúkrahúsinum, so var hetta brot á galdandi lóggávu og sáttmála og tí vildi málið antin enda í gerðarættinum ella hjá løgtingsins umboðsmanni.

Í mars 2003 heitti Almanna- og heilsumálaráðið á Ljósmøðrafelagið og Landssjúkrahúsið um at gera viðmerkingar til málið um starvið sum leiðandi ljósmóðir. Landssjúkrahúsið boðar frá, eftir at hava havt fund við allar involveraðar partar á Landssjúkrahúsinum, at rættast er at seta ein bólk til at útgreina hvussu føroyska føðiskipanin skal virka. Landssjúkrahúsið mælir millum annað til henda arbeiðssetning:

- Hvussu skal tænastan mótvegis barnakonum í Føroyum verða
- Hvussu skal samstarvið millum sjúkrahúsini verða skipað
- Hvussu skal føðiskipanin verða organiserað

Landsstýrismaðurin tók undir við hesum uppskotinum um at seta ein bólk, og sendi uppskotið til arbeiðssetning til hoyringar, men tann næsti trupulleikin hevur verið at finna tað røttu orðingina til arbeiðssetning. Ljósmøðrafelagið góðtók ikki arbeiðssetningin omanfyri, tí ongin trygd var fyri, at sjálv ljósmøðraskipanin fór at verða viðgjørd í bólkinum.

Í september 2003 tók landsstýrismaðurin avgerð um at seta bólkin og í samráð við Ljósmøðrafelagið, at arbeiðssetningurin skuldi orðast soleiðis:

1. Hvussu skal tænastan mótvegis barnakonunum í Føroym verða?
2. Hvussu skal ljósmøðraskipanin verða organiserað?
3. Hvussu skal ljósmøðraskipanin samskipast millum sjúkrahúsini?

Hesi umboð blivu vald í arbeiðsbólkin:

- Turid Petersen, kommunulækni og vald av Kommunulæknafelag Føroya
- Ruth Vang, ljósmóðir og vald av Ljósmøðrafelag Føroya
- Sanna Hansen, ljósmóðir og vald av Ljósmøðrafelag Føroya
- Petra Henriksen, ljósmóðir og vald av Ljósmøðrafelag Føroya
- Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri og vald av Landssjúkrahúsinum
- Steintóra Samuelsen, yvirlækni og vald av Landssjúkrahúsinum
- Sólfríða Helmsdal, (sjúkrarøktafrøðingur) deildarleiðari og vald av Landssjúkrahúsinum
- Jan Simonsen, fulltrúi og valdur av Familju- og heilsumálaráðnum

Í tíðarskeiðinum eftir 1. september 2005 hevur Eyðfríð Jacobsen frá Ljósmøðrafelagnum luttikið fyri Ruth Vang, ið er farin frá sum ljósmóðir. Eftir 1. november 2005 hevur Kristina Poulsen, virkandi sjúkrarøktarfakligur leiðari, luttikið fyri Sólfríðu Helmsdal, ið var farin í farloyvi.

Harumframt hevur Selma Davidsen og seinni Gidda Vang frá aðalráðnum luttaka sum skrivarar á fundunum.

Á fyrsta fundinum í bólkinum, sum varð hildin 4. desember 2003, varð millum annað arbeiðssetningurin viðgjørdur. Avgjørt varð, at arbeiðssetningurin átti at broytast soleiðis, at hann

ikki bert viðgjørdi eina ljósmøðraskipan, men í størri mun tók atlit til eina heildarætlan fyri barnakonur og hvussu arbeiðið skal skipast í heilsuverkinum fyri, at ein viðgongu- og burðarskipan kemur at virka nøktandi og á skynsamasta hátt í Føroyum. Læknaumboðini, t.e. Steitóra Samuelsen og Turid Petersen meintu ikki, at tær høvdu nakað at gera í arbeiðsbólkinum um arbeiðssetningurin ikki bleiv broyttur. Samstundis hava ljósmøðurnar gjørt klárt, at tað týdningarmesta fyri teirra øki er, at bólkurin viðgerð og ger tilmæli um hvussu ein ljósmøðraskipan skal skipast í heilsverkinum. Út frá omanfyri nevndu sjónarmiðum varð arbeiðssetningurin broyttur:

1. Hvussu skal ein viðgongu- og burðarætlan verða fyri barnakonur í Føroyum.
2. Hvussu skal ljósmóðurskipanin verða organiserað í heilsuverkinum.
3. Hvussu skal ljósmóðurskipanin verða samskipað við aðrar fakbólkar í heilsuverkinum fyri at viðgongu- og burðarskipanin kemur at virka nøktandi og á skynsamasta hátt í Føroyum?

Turid Petersen í bólkinum hevur boðað frá, at hon framvegis ikki ynskir at hava ávirkan á punkt 2 í arbeiðssetninginum, sum viðvíkur organisering av ljósmøðraskipan. Steintóra Samuelsen hevur tó seinni ynskt at verða við í viðgerðini av øllum arbeiðssetningum.

# Hvussu skal ein viðgongu- og burðarætlan verða fyri barnakonur í Føroyum?

Sambært §§ 2. stk. 1 og 8. stk. 1 í "Kongelig anordning nr. 643 af 9. December 1982 om ikrafttræden på Færøerne av lov om svangerskabshygiejne og fødselshjælp" er tað danska heilsustýrið ið ger leiðreglur viðvíkjandi fyribyrgjandi heilsukanningum av barnakonum umframt føðingarhjálp. Í sambandi við at bólkurin hevur arbeitt við hvussu ein viðgongu- og burðarætlan skal verða fyri barnakonur í Føroyum eru atlit tikin til seinastu leiðreglurnar hjá Heilsustýrinum[1], ið fingu gildi frá 1. juli 1998.

Endamálið við eini burðar- og viðgonguskipan í Føroyum er at hjálpa og skapa tryggleika fyri kvinnuna og familjuna í viðgongutíðini og í einum tíðarskeiði eftir at kvinnan hevur føtt, soleiðis at tað skapast ein tryggleiki fyri, at barnið fær ein sunna byrjan uppá lívið. Endamálið er soleiðis, at styrkja og stuðla kvinnuni og hennara familju fysiskt og sálarliga undir viðgongu, føðing og tíðini beint aftaná soleiðis at barnið í allar mátar fær eina góða lívsbyrjan. Fokus skal vera á familjuna sum heild, m.a. skulu tilboðini tillagast soleiðis at makin fær ein náttúrligan leiklut í øllum tilboðunum. Atlit skulu takast til føroysk viðurskifti, eitt nú at tær barnakonur, ið ikki búgva á meginøkinum ikki vera við skerdan lut viðvíkjandi teimum tilboðum heilsuverkið bjóðar.

Endamálið verður orðað soleiðis:

- Allir nýføðingar skulu hava eina góða og sunna byrjan uppá lívið.
- Innsatsurin fyri at minka um nýtsluna av rúsevnum og tubbak skal styrkjast
- Tað skal tíðliga og í størsta mun tryggjast ein skipaður stuðul til kvinnur við barni, ið samtíðis hava sálarligar-sosialar trupulleikar.
- Øll skulu hava sama rætt og møguleika til tænastu av einari høgari góðsku.

[1] Svangreomsorg, retningslinjer og redegørelse (Sundhedsstyrelsen 1998)

Niðanfyri verða nevnd tey tilboð, ið bólkurin er samdur um skal verða galdandi í viðgongu- og burðartíðini og sum eru í trá við endamálið omanfyri.

Tilboðini eru deild upp í tríggjar fasur:

- *áðrenn føðing,*
- *føðingartíðarskeiðið*
- *eftir føðing*

**Tíðin áðrenn føðing**

Viðtaluskrá
Arbeiðsbólkurin er samdur um, at viðtaluskráin hjá barnakonuni kemur at síggja soleiðis út:
Hjá Kommunulækna í viku 6-10, 24 og 35
Hjá ljósmóðir í viku 12, (16), (22), 28, 32, 37, 39, 40, 41 og 42.

Talið í klobrum merkir, at tað er ein meting hjá ljósmøðrunum um tørvur er á hesum viðtalum. Bólkurin metir, at tann fyrsta viðtalan er serliga týdningarmikil og at tað tí eigur at setast meira tíð til hesa viðtalu (umleið ein tíma) í mun til hinar viðtalurnar (umleið 20 min.).

Innihaldi í viðtalunum skal vera í samsvar við tilmælini frá danska Heilsustýrinum. Harafturat skal makin fáa tilboð um at taka lut í viðtalunum.

Ultraljóðskanning
Ultraljóðskanning skal verða boðin øllum barnakonum í Føroyum í viku 18-19. Harumframt skal eftir tørvi verða boði ultraljóðskanning til kvinnur við medisinskum sjúkum eftir obstetiskari serlæknameting.

Barnakonur við fysiskum trupulleikum vegna barnsburð
Barnakonur við serligum fysiskum trupulleikum, skulu fáa tilboð um relevanta viðgerð innan sjúkrahúsverkið, sum t.d. fysioterapi, akupunkturviðger, ortopædi, v.m.

Roykjandi barnakonur
Skeið um roykifrávenjing skal verða eitt tilboð til allar barnakonur, ið roykja. Í fyrstu viðtalu skal verða kunnað um vansarnar við royking í burðartíðini og upplýst skal verða um møguleikar viðvíkjandi roykifrávenjingarskeiði. Í hesum sambandi verður tað mett neyðugt, og tí eisini mælt til, at fleiri starvsfólk innan sjúkrahúsverkið verða útbúgvin til at hava skeið um roykifrávenjing.

Ressursuveikar barnakonur
Starvsólk innan heilsuverkið, ið eru um barnakonuna í burðartíðini, skulu brynjast betur fakliga til at kenna aftur og taka sær av hesum konum, sum av ymsum orsøkum eru resursuveikar. Tað kann vera sálarliga sjúkar kvinnur, kvinnur við sosialum trupulleikum, misnýtslu, misnýttar kvinnur o.s.fr.

Sambært grein 4 í "Kongelig anordning nr. 643 af 9. december 1982 om ikrafttræden på Færøerne av lov om svangerskabshygiejne og fødselshjælp" stendur, at:

*"Hvis lægen eller jordemoderen har opfattelsen af, at kvinden har personlige, sociale eller økonomiske vanskeligheder, bør hun henvises til det sociale udvalg i opholdskommunen, eller såfremt et sådant ikke findes, til landsstyrets socialforvaltning (Almannastovan)".*

Í framtíðini verður tað tó í størri mun barnaverndarnevndurnar, ið koma at seta fyriskipanir í verk fyri tílíkar kvinnur/børn. Sambært § 14 í barnaverndarlógini, ið fær gildi 1. januar 2006, hava starvsfólk innan heilsuverkið fráboðanarskyldu, tá ið tey varnast, at kvinnur við barn hava ávarsama rúsevnismisnýtslu, sálarsjúku ella sálartrupulleikar. Í § 14 stk. 1 stendur:

*"Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum".*

Í § 14, stk 3 verður nágreina, at upplýsingarskildan eisini er galdandi viðvíkjandi kvinnum, ið eru við barn:

*"Fráboðast skal eisini viðvíkjandi kvinnum, ið eru við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna álvarsama rúsevnismisnýtslu, sálarsjúku ella sálartrupulleikar".*

Arbeiðsbólkurin mælir til, at øll starvsfólk, ið eru um kvinnur, ið eru við barn, verða kunnaði um hesar reglur um fráboðanarskyldu, og at listar við barnarverndarnevndunum í landinum verða sjónligir fyri teimum, soleiðis at fráboðast verður skjótast gjørligt til nevndirnar um hetta verður mett neyðugt. Soleiðis kunnu viðurskiftini verða kannað nærri og neyðug fyriskipan kann verða sett í verk har tørvur verður mettur á tí.

Føðingarfyrireiking
Øllum barnakonum og makum teirra skal standa í boðið føðingarfyrireiking. Føðingarfyrireikingin inniheldur kunning um viðgongu, føðingina og tíðina eftir føðing og skal stuðla uppundir at menna foreldraførleikan.

Eitt skeið í føðifyrireiking fevnir vanliga um 10 tímum tilsamans. Tað er tó ljósmóðurin ið metur um tørvin og hevur eisini ábyrgdina av tilboðnum. Eftir tørvi kunnu eisini nýtast undirvísarir frá øðrum fakbólkum, sum t.d. læknar, heilsufrøðingar, fysioterapeutar og sosialráðgevarar.

Innlagdar barnakonur
Sjúkar barnakonur ið tørva innlegging skulu hava tilboð um at verða lagdar inn á serdeild. Um talan er um sjúkur ið hava beinleiðis samband við barnsburðin skulu tær fáa tilboð um at verða lagdar inn á Føðingardeildina A2 á Landssjúkrahúsinum. Er talan um aðar sjúkur, ið ikki hava beinleiðis samband við barnsburðin, skulu tær fáa tilboð um at verða lagdar inn á aðrar serdeildir á Landssjúkrahúsinum.

**Føðingartíðarskeiðið:**
Sambært grein 3 stk. 2 í "Kongelig anordning nr. 643 af 9. december 1982 om ikrafttræden på Færøerne av lov om svangerskabshygiejne og fødselshjælp" stendur, at:

*"Kvinder har ret til fødselshjælp enten ved adgang til vederlagsfri fødselsbetjening på sygehuse eller til vederlagsfri jordemoderhjælp ved fødsel i hjemmet".*

Egin uppliving av føðingini – ótengt at hvussu fakfólk uppliva hana – hevur týdning fyri hvussu hon gerst mamma og knýtir seg til sítt barn. Støðið skal tí takast í tí einstøku kvinnuni/familjuni og innanfyri givnu karmar skulu atlit takast til, at hennara tørv og ynski verða nøktaði.

<u>Føðing á sjúkrahúsi</u>
Kvinnur sum eiga á sjúkrahúsi, skulu fáa tilboð um at liggja 3-5 dagar á sjúkrahúsinum eftir føðing. Har umstøðurnar annars ikki tala ímóti tí kunnu tær eiga ambulant og fara heim umleið 6 tímar eftir føðing.

Í teimum førum, har øktur vandi er staðfestur viðvíkjandi viðgongu, føðing ella barni, skal kvinnan eiga á obstetriskari serdeild við tilknýttari neonataldeild. Hetta merkir at føðingin skal verða á Landssjúkrahúsinum, sum støðan er í dag.

Viðvíkjandi teimum barnakonum sum skulu eiga á Landssjúkrahúsinum, men hava bústað har tað ikki er landfast, skulu atlit takast til teirra familjur. Eitt nøktandi stað at vera í skal vera fyri hesar familjur í Tórshavn. Miðjast skal ímóti, at barnakonan kann verða heima sum longst. Um umstøðurnar tala fyri tí, skal møguleiki vera fyri at fáa barsilshvíld á Suðuroyar/Klaksvíkar sjúkrahúsi.

<u>Heimaføðing</u>
Barnakonur hava rætt til ljósmøðrahjálp, um tær ynskja at eiga heima. Barnakonur, ið ikki væntast at eiga normalt, skulu mælast frá at eiga heima.

**<u>Tíðin eftir føðing:</u>**

<u>Grundleggjandi røkt og eygleiðing</u>
Allar mammur skulu fáa vegleiðing í grundleggjandi røkt og eygleiðing av nýfødda barninum.

<u>Bróstageving</u>
Allar mammur, skulu fáa tilboð, áðrenn tær fara heim, um skipaða vegleiðing og stuðul, so møguleiki er fyri at bróstgevingin er væletablerað sambært tilmæli frá danska heilsustýrinum um bróstageving (skjal 1) (sí eisini "Modermælkens unikke indholdsstoffer" (skjal 2)).

Mælt verður til, at sjúkrahúsini arbeiða eftir "Babyfriendly" meginreglunum (sí "Nationale kriterier for spædbarnsvenlige sygehuse (skjal 3)).

<u>Barsilsfimleikur</u>
Allar mammur skulu fáa møguleika at verða við til ella fáa kunning um barsilsfimleik áðrenn heimferð.

<u>Læknakanning</u>
Tilboð um læknakanning skal verða veitt øllum nýføddum børnum. Barnakanningin skal verða framd í seinasta lagi 1 viku eftir føðing. Kanningin kann verða gjørd antin á føðistaðnum ella hjá kommunulæknanum. Harumframt skulu allar kvinnur fáa tilboð um læknakanning hjá kommunulækna 8 vikur eftir føðing.

Eftirføðingarkanning og samrøða
Allar kvinnur skulu hava tilboð um eftirkanning og samrøðu hjá ljósmóðir. Kanningin skal avdúka um eftirføðingarbløðing, kokubotnafunktión, møguliga seyming og onnur viðurskifti eru sum tey skulu vera. Endamálið við samrøðuni er at geva kvinnuni møguleika fyri at tosa um sína uppliving av viðgongu og føðing. Herundir at hjálpa kvinnuni betur at skilja hví og hvussu møgulig inntriv eru farin fram. Um ljósmóðurin hevur varugan av at føðingarupplivingin fer at geva kvinnuni trupulleikar kann hon avtala eina uppfylgjandi samrøðu seinni. Harumframt tosar ljósmóðurin við kvinnuna um samlív og fyribyrgjan. Viðvíkjandi innihaldi annars í samrøðuni verður víst til s. 56-57 í áðurnevndu leiðreglunum hjá Heilsustýrinum.

Burðarumsorgan í sambandi við heimaføðing og ambulanta føðing
Kvinnur, sum eiga heima ella ambulant, skulu fáa tilboð um 2 vitjanir av ljósmóðir. Tann fyrsta eigur ljósmóðurin, ið var við til føðingina, taka sær av og hendan vitjanin eigur at vera 1-2 dagar aftaná føðingina, tó í seinasta lagi 24 tímar aftaná eina heimaføðing. Tað næstu vitjanina tekur viðtaluljósmóðurin sær av 6-10 dagar eftir føðingina. Heilsufrøingurin eigur at vitja 3. og 5. dagin eftir føðing umframt umleið 14 dagar aftaná. Ljósmóðurin hevur ábyrgdina fyri at samskipa vitjanirnar[2].

Stuðul frá teimum nærmastu
Pápar, ið ynskja tað, skulu fáa møguleika at verða saman við mammu og barni í tann mun tað letur seg gera á sjúkrahúsdeildunum. Arbeiðast skal eisini fram ímóti, at teir pápar, ið ynskja at verða saman við mammu og barni alt døgnið, fáa henda møguleika (sjúklingahotelvirksemi).

Mammur ið hava álvarsamar trupulleikar áðrenn ella eftir barnsburð, skulu hava møguleika at hava onkran av sínum nærmastu hjá sær.

Er/gerst barnið sjúkt, doyr ella er deyðføtt, skulu foreldrini hava møguleika alt døgni at verða á somu deild sum barnið.

## Góðskutrygging av viðgongu- og burðarskipan

Truplir føðslar
Mælt verður til at sjúkrahúsini skulu skipa fyri, at tvørfaklig audit verða hildin í sambandi við serliga truplar føðslar har øll fakfólkini luttaka, ið hava verið við til føðingina .

Skiftiskipan
Mælt verður til at ein skiftisskipan verður sett í verk har ljósmøður frá smærri sjúkrahúsunum koma á Landssjúkrahúsið at arbeiða og umvent. Bólkurin metir at hetta hevði verið mennandi fyri báðar partar.

[2] Fyri at náa tilmælinum frá Heilsustýrinum um at stuðla mammunum at geva bróst í 6 mánaðar, verður sum nú er stórt arbeiði gjørt á Føðideildini, fyrstu dagarnar eftir burð. Úrslitini hava eisini verið góð tá ið tær fara heim. Fyri framvegis at fylgja tilmælinum frá Heilsustýrinum, er neyðugt at Heilsurøktarskipanin og ljósmóðirskipanin í góðari tíð verða fyrireikað til hetta í sambandi við heimaføðingarnar og tær ambulantu føðingarnar, soleiðis at skipanirnar taka við og veita serliga hjálp til bróstageving tað fyrstu vikuna eftir at kvinnurnar hava átt. Royndirnar vísa nevnliga, at verður góð hjálp veitt fyrstu vikuna økjast møguleikarnir at halda á at geva bróst.

Evnisdagur/ráðstevna hvørt hálvár

Fyri at menna og styrkja skipanina og samstavið millum primera og sekundera sektorin, verður mælt til at tað verður hildið eitt tiltak, ið kann skipast sum ein evnisdagur/ráðstevna hvørt hálvár har kommunulæknar, ljósmøður og heilsufrøðingar luttaka. Fyri at fyrireika ein tílíkan dag, eigur tað at verða sett ein nevnd, við einum umboði frá hvørjum luttakandi fakbólki, ið leggur dagin til rættis. Á einum tílíkum degi verður millum annað viðgjørt hvussu skipanin virkar, um ábøtur skulu fremjast, umframt at fólk útifrá kunnu hava fyrilestrar um evnir ið hava týdning fyri menningina av eini viðgongu- og burðarskipan í Føroyum.

**Føðingarstøð í Føroyum**

Í arbeiðsbólkinum hevur verið stór ósemja millum Steintóru Samuelsen, yvirlækna og ljósmøðurnar um tað er ráðiligt at føðslar eru á øllum trimum sjúkrahúsunum í Føroyum. Fyri at klárgera ósemjuna verða grundgevingarnar hjá ávíkavist Steintóru Samuelsen, yvirlækna og ljósmøðrunum lagdar fram niðanfyri.

Grundgevingar hjá ljósmøðrunum fyri føðistøð í Føroyum

Danska Heilustýri ger í tilmæli sínum "Svangreomsorg. Retningslinjer og redegørelse", greitt viðvíkjandi hvar ið barnakonur skulu eiga. Víst verður til brotið "4.4. Visitation til fødested og fødselshjælp" s. 23 – 26.
Grundað á omanfyrstandandi, mæla ljósmøðurnar til fylgjandi:

- Føðingar fara fram á serdeild (Landssjúkrahúsinum), skurðdeild á sjúkrahúsi (Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahúsi) og heima.
- Kvinnan kann velja sjálv, hvar hon vil eiga, eftir fakligari ráðgeving.
- Har staðfestast kann at øktur vandi er ella kann væntast at vera fyri kvinnu og/ella barn, verður mælt til at føðingin fer fram á Landssjúkrahúsinum.

Ásannandi at gongdin í grannalondum okkara og at røddir her heima eisini tala fyri at miðsavnað føðingar á serdeildum, vilja undirritaðu ljósmøður vísa á, at henda gongd ikki er grundað á vísundaligt støði. Enn er ikki eydnast at vísa á, at tað í sambandi við lág-vanda-føðingar er betur fyri mammu og/ella barn at eiga á serdeild. So leingi hetta er galdandi kunnu vit sum ljósmøður ikki koma við fakligum tilmælum, sum siga, at allar føðingar skulu fara fram á serdeild. Tað er harafturímóti grundarlag fyri at taka atlit til onnur viðurskifti, t.d. hvar kvinnan kennir seg tryggast.

Tá hetta er sagt, skal eisini sigast, at neyðugt er støðugt at endurskoða førleika og umstøður á *øllum* føðingarstøðum, fyri at tryggja at hesi liva upp til tey krøv sum kunnu setast serdeild ávíkavíst skurðdeild.

Tað kunnu vera onnur viðurskifti, sum tala fyri at miðsavna føðingar, eitt nú fíggjarlig. Tá vit eru settar í arbeiðsbólk sum ljósmøður, hava vit mett tað, at vera hóskandi at koma við ljósmøðrafakligum tilmælum og ikki fíggjarligum.

Viðvíkjandi arbeiðinum í arbeiðsbólkinum, mugu vit hava í hugað, at tað undir øllum umstøðum koma at vera barnakonur í øllum Føroyum, og at tað eitt nú í Suðuroy kemur at vera tørvur á ljósmóðir í mong ár, um barnakonur eiga á Suðuroyar sjúkrahúsi ella ikki. Tí meta vit ikki at spurningurin um hvar kvinnar eiga, er so avgerandi í mun til restina av arbeiðssetninginum.

Grundgevingar hjá Steintóra Samuelsen, yvirlækna fyri føðistøð í Føroyum
700 kvinnur eiga í Føroyum árliga. Tær flestu eiga á sjúkrahúsi, men hava tó rætt til at eiga heima um tær ynskja tað og tá hava tær rætt til at hava eina ljósmóðir at vera hjá. At flestu kvinnur eiga á sjúkrahúsi má síggjast í ljósinum av teimum vandum sum barnakonur kunnu koma út fyri. Fyri at økja um trygdina í sambandi við burðin, og aftaná, hevur verið strembað ímóti at konur skulu eiga á sjúkrahúsi. Hjálpin er nærmast har, um manningin er tann hon eigur at vera.

Gjøgnum kliniskan kunnleika veit mann, at nakrir burðartrupulleikar, t.d. bløðingar, kunnu koma uttan nakran varsul, ið kann verða lívshóttandi fyri móðir og barn. Hetta má takast við stórum álvara, og tí er tað sostatt orsøkin til, at spurningurin um hvar konur skulu eiga í Føroyum ikki er so trupul, sæð út frá eini vágameting og eini góðskutygging. Eingin vágameting kann gerast til visiteringar um ein tekur vandan við. Konur eiga at føða á einum sjúkrahúsi har burðarlæknar eru. Tíðin er farin frá tí, at allir skurðlæknar kunnu gera keisaraskurð og hetta er ein stórur trupulleiki í tíðarskeiðum, har teir føstu læknarnir á teimum smáu sjúkrahúsunum eru í frígongu.

Í bókini "Pregnancy" (british medical bulletin, 2003) verður víst á, at tað skulu altíð vera læknir tøkir, sum kunnu gera keisaraskurð. Um ein barnakona skal doyvast, eigur narkosulækni at vera á staðnum tí at doyving av barnakonum verður mett at krevja ein narkosulækna. Ongin barnakona á Landssjúkrahúsinum verður doyvd uttan at hesin læknabólkur er hjástaddur. Afturat hesum kemur so kravið um barnalækna, sum er týdningarmikið fyri at børnini kunnu fáa optimala byrjan á lívið um okkurt er áfatt.

Sæð út frá hesum, tilmælir Steintóra Samuelsen, yvirlækni og umboð í arbeiðsbólkinum, at allar kvinnur í Føroyum føða børnini sambært omanfyrinevndu treytum, ið einans Landssjúkrahúsið lýkur.

# Hvussu skal ljósmøðraskipanin verða organiserað í heilsuverkinum

Áðrenn 1983 arbeiddu ljósmøður sum fylkisljósmøður, settar sum danskir tænanstumenn av ríkisumboðnum. Talið av ljósmøðrastørvum og í tí sambandinum hvar tey skuldi setast umframt krøv til bústað hjá viðkomandi ljósmóður, vóru ásett av landsstýrinum í samráð við kommunur og landslækna, men skuldi tó góðkennast av ríkisumboðnum.

Fasta lønin hjá eini ljósmóðir var ein ásettur prosentpartur av eini tænastumannaløn (55-65%). Harafturat kom so gjald fyri føðingar og kanningar. Til miðskeiðis í 1970´unum var tað kvinnan sjálv, ið skuldi rinda eina upphædd svarandi til 1% av húsarhaldsinntøkuni. Seinni var tað ríkisumboðið, sum rindaði ljósmøðrunum eitt ávíst gjald fyri hvørja føðing og fyri hvørja kanning.

Áðrenn 1983 var eisini álagt kommunum at veita hølir til ljósmøðraviðtalur. Sostatt var eingin ljósmóður sett á sjúkrahúsunum, men tær arbeiddu sjálvstøðugt undir eftirliti av landslæknanum.

Gjøgnum 1960´ini og 1970´ini gjørdist alt meira vanligt, at kvinnur átti á sjúkrahúsi. Í 1950 vóru umleið 30% av føroysku børnunum fødd á sjúkrahúsi, í 1967 var talið 79% og í 1978 vóru heili 97% fødd á sjúkrahúsi. Gongdin var, at tær kvinnur, ið lættliga kundu koma á sjúkrahús at eiga valdu tað loysnina, meðan fleiri kvinnur í Eysturoynni átti heima, til ferðasambandi bleiv munandi betra í 1970´unun (brúgvin um Streymin og Norðskálatunnilin).

Ljósmøðurnar høvdu vakt stórt sæð altíð og vóru til føðingar tá ið tær vóru boðsendar, antin heima ella tær fóru við konunum á sjúkrahúsið. Fram til mitt í 1970`unum var vanligt at konan fór heimaftur fáar tímar eftir at hon hevði átt. Við tíðini var tó mett, at tað var betri at konan varð liggjandi nakrar dagar, tó fór ljósmóðurin vanliga heim av sjúkrahúsinum umleið 2 tímar eftir føðingina.

Í 1970´unum gjørdist greitt, at tørvur var á at endurskoða verandi skipan fyri bæði barnakonur og ljósmøður. Um somu tíð var kommunulæknaskipanin eisini endurskoða.

Í 1978 verður ein arbeiðsbólkur settur til at gera uppskot til nýggja ljósmøðraskipan. Í bólkinum sótu sjúkrahússtjórin, umboð fyri ríkisumboðið, landsstýrið, ljósmøðurnar og Læknafelagið. Úrslitið av arbeiðinum var millum annað, at tað í 1983 var sett á stovn føroyska ljósmøðraskipanin, sambært "Kongelig anordning nr. 643 af 9. desember 1982 om ikrafttræden på Færøerne af lov om svangerskabshygiejne og fødselshjælp". Skipanin er eftir donskum leisti, har fyrimyndin er danska centerordningin, sum hevði virkað síðani 1973. Skipanin varð tó tillaga til føroysk viðurskifti.

Bygnaðarliga hevði hetta við sær, at 13 ljósmøður vóru settar undir sjúkrahússtjóranum. Hesin var stjóri fyri øll trý sjúkrahúsini. Trýggjar ljósmøður vóru settar á Landssjúkrahúsinum, sonevndar "havnarljósmøður". Hinar tíggju vóru settar sum økisljósmøður runt um í landinum, sonevndar "bygdaljósmøður" (2 í Norðoyggjum, 1 í Norðstreymoy, 3 í Eysturoy, 1 í Vágum, 1 í Sandoy og 2 í Suðuroy). Harumframt varð sett ein leiðandi ljósmóðir, sum varð sett av landsstýrinum.

Vegna ov stóra arbeiðsbyrðu vera við tíðini settar fleiri havnarljósmøður, og í 1986 verður sett ein yvirljósmøður sum sambært sáttmála millum landsstýrið og Ljósmøðrafelagið skal leggja arbeiðið á deildini á Landssjúkrahúsinum til rættis.

Leiðandi ljósmóðir skal sambært áðurnevndu kongaligu fyriskipanini arbeiða við "...planlægning, koordination og instruktion vedrørende den færøske jordemoderordning". Í setanarsáttmálanum kom at standa, at leiðandi ljósmóðir hevði ábyrgd og umsitingarleiðslu av teimum ljósmøðradeplum/økjum, sum eru í Føroyum.

Økisljósmøðurnar høvdu frá byrjan av eina viðtalu- og eina døgnvakt á Landssjúkrahúsinum og tvey frísamdøgur um vikuna. Annars høvdu tær vakt frá heiminum, soleiðis at barnakonur í teirra øki, ið høvdu tørv á ljósmóðir, ringdu til økisljósmóðurina. Hetta fingu tær eina árliga viðbót fyri.

Av tí at arbeiðsbyrðan á Landssjúkrahúsinum alsamt gjørdist størri og tíðin sýntist at fara frá at hava vakt døgnið runt, blivu økisljósmøðrastørvini í 1992, har tað var landfast, umløgd til at vera vanlig ljósmøðrastørv við 40 tíma arbeiðsviku. Eins og fyri aðrar starvsbólkar á sjúkrahúsunum komu ljósmøðurnar í meginøkinum, vegna bústað ov langt frá sjúkrahúsinum, fyri tað mesta at hava vakt fra vaktrúmi. Økisljósmóðir hevur ikki verið á Sandi síðani í 1990-91, og vegna at ongin umsøkjari var í longri tíð til tað starvið, varð tað lagt um til at verða eitt vanligt ljósmóðirstarv á Landssjúkrahúsinum. Eftir at fast samband er til Vágoynna, er eisini økisljósmóðirstarvið í Vágoy lagt um til eitt vanligt ljósmóðirstarv.

Umframt nevndu orðingar í áðurnevndu kongaligu fyriskipanini og setanarsáttmálanum er ikki gjørd nøkur lýsing av starvsøkinum hjá leiðandi ljósmóðir. Sum í øðrum førum er skeitt at donskum lýsingum ið partarnir hava roynt at hildi seg til.

Ingibjørg Rasmussen røkti starvi sum leiðandi ljósmóðir frá 1983 til hon varð pensjonerað í 1999. Áðrenn Ingibjørg fór úr starvinum í 1999 settu ljósmøðurnar seg í samband við Almanna- og heilsumálaráðið tí tær saknaðu eina lýsing av av starvinum viðvíkjandi arbeiðsuppgávum og ábyrgd. Ljósmøðurnar hildu tað vera hóskandi at fáa hetta gjørt nú nýggj leiðandi ljósmóðir skuldi setast.

Táverandi aðalstjóri gjørdi vart við, at leiðandi ljósmóðir hekk í "leysari luft", orsaka av teimum bygnaðarbroytingum ið høvdu verið innan sjúkrahúsverkið. Sjúkrahússtjórastarvið var niðurlagt og tey trý sjúkrahúsini høvdu fingið hvør sína leiðslu. Ljósmøðurnar, ið settar vóru á sjúkrahúsunum høvdu tí tilvísing til leiðslurnar á sjúkrahúsunum. Eisini gjørdi táverandi aðalstjóri vart við, at tilvísingar- og setanarmyndugleiki hjá leiðandi ljósmóðir var aðalstjórin. Hesir báðir myndugleikar eru bygnaðarliga atskiltir partar.

Orsaka av teimum bygnaðarligu trupleikunum ið vóru íkomnir tók Almanna- og heilsumálaráðið stig til at seta ein arbeiðsbólk í 1999 til at endurskoða ljósmøðraskipanina. Onki úrslit kom burtur úr hesum arbeiði og bólkurin varð stutt eftir niðurlagdur aftur.

**Framtíðar ljósmøðraskipan**

Niðanfyri verður tikið útgangsstøðið í hvussu ljósmøðurnar í bólkinum mæla til hvussu ein ljósmóðurskipan eigur at virka í Føroyum. Harnæst verður viðmerkt hvat aðrir partar í arbeiðsbólkinum meta um tilmælið hjá ljósmøðrunum.

Broyttar fortreytir

Tilmæli hjá ljósmøðrunum er partvíst grundað á tað, sum nýliga er hent viðvíkjandi umleggingum á Landssjúkrahúsinum.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur sett í verk umleggingar á sjúkrahúsinum, ið hava við sær at Ljósmøðraskipanin og føðingardeildin, sum frammanundan er mannað við sjúkrarøktarfrøðingum og sjúkrarhjálparum, verða samanlagdar og koma at hava felags deildarleiðara. Sambært fráboðan frá sjúkrahúsleiðsluni kann hesin leiðari antin vera ljósmóðir ella sjúkrarøtarfrøðingur ella bæði. Harafturat eru tveir leiðarar við fakligari ábyrgd settir, fyri ávikavist ljósmøðra- og sjúkrarøktarfakliga økið.

Leiðsluspurningurin

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur fyribils sett virkandi leiðandi ljósmóðir, sum deildarleiðara. Virkandi leiðandi ljósmóðir røkir sostatt tvey størv í løtuni. Í kunningarskrivi sigur sjúkrahúsleiðslan :"Viðvíkjandi starvinum sum leiðandi ljósmóðir, so er hetta eitt mál, sum Almanna- og heilsumálaráðið tekur sær av". Her verður helst tilskilað til tað arbeiði, sum arbeiðsbólkurin situr við.

Sostatt meta ljósmøðurnar í bólkinum, at støðan hjá størsta partinum av føroysku ljósmøðrunum er broytt munandi og er samtíðis vorðin enn ógreiðari og ótryggari. Frá at hava tvey ljósmøðraleiðarastørv - ein deildarleiðara (yvirljósmóðir)á Landssjúkrahúsinum, og eina leiðandi (lands) ljósmóðir – meta tær seg nú at vera í teirri støðu at ein samanleggjing av deildarleiðara og leiðandi ljósmóðir er framd, men uttan trygd fyri at starvið verður røkt av eini ljósmóðir. Sigast skal, at nýgjørda starvið sum fakligur leiðari er uttan fyrisitingarligar heimildir. Leiðsluviðurskiftini

hjá ljósmøðrunum undir fyriliggjandi uppskoti hjá sjúkrahúsleiðsluni eru nógv versnaðar, sambært ljósmøðrunum í bólkinum.

Sambært ljósmøðrunum eru hvørki ljósmøður ella sjúkrarøktarfrøðingar nøgdar við leiðsluloysnina, tí báðir partar tilskila sær rættin til deildarleiðaran. Í hesum sambandi hava ljósmøðurnar m.a. ført fram, at:

- Ljósmøður kunnu aldri vera fyri uttan á eini føðingardeild.
- Serøkið hjá ljósmøðrunum saman við felagsøkjum hjá báðum starvsbólkum er munandi størri enn serøkið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum.
- Á nýggju felagsdeildini vera stór virkisøkið, sum sjúkrarøktarfrøðingur onki fakligt innlit hevur í.
- Viðvíkjandi tí, sum leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur staðfest sum serøkið hjá sjúkrarøktarfrøðingum, hava ljósmøður bæði lógásetta og fakliga kompetansu til at røkja.
- Sjúkrarøktin er óansæð umboðað á øllum leiðslustigum á Landssjúkrahúsinum, um deildarleiðarin ikki er ljósmóðir, hava ljósmøður *onga* fyrisitingarliga leiðslu her á landi!
- Leiðandi ljósmóðir kann aldrin vera ein sjúkrarøktarfrøðingur.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur skrivliga boðað ljósmøðrunum frá, at havandi í huga at ljósmøður í mun til sjúkrarøktarfrøðingar røkja eina størri breidd av samlaða virkseminum á nýggju deildini, alt annað líka, hava framíhjárætt at vera settar í starv sum deildarleiðari. Hetta, saman við tí veruleika, at ein ljósmóðir er fyribilssett sum deildarleiðari, og at starvið sum leiðandi ljósmóðir verður røkt av sama persóni, tulka vit sum at leiðslan helst sær at tað er ein ljósmóðir sum permanent røkir deildarleiðarastarvið. Hetta siga ljósmøðurnar tó seg ikki hava fingið staðfest enn.

Tilmæli frá ljósmøðrunum í arbeiðsbólkinum:

Í sambandi við umleggingarnar á Landssjúkrahúsinum hava ljósmøður, í mun til áður, fingið eina deild og kenna seg tí eisini í størri mun at vera ein náttúrligur partur av sjúkrahúsorganisatiónini – sjálvandi treytað av nøktandi leiðsluviðurskiftum.
Havast skal tó í huga, at ljósmøður virka eisini uttanfyri Landssjúkrahúsið og at hesar eisini hava tørv á fakligari leiðslu.
Við atliti til innihald í lóg og sáttmála, vilja ljósmøðurnar mæla til at:

- Leiðandi ljósmóðir verður sett sum deildarleiðari á nýggju føðingardeildini á Landssjúkrahúsinum við teimum ábyrgdum og heimildum sum leiðslan tilskilar.
- Leiðandi ljósmóðir hevur ovastu *fakligu* ljósmøðraábyrgd í Føroyum, tað vil siga at hon innanfyri galdandi fyrisitingarligu rammur á Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahúsi, skal tryggja neyðuga fakliga støði á hesum báðum ljósmøðradeplum.
- Leiðandi ljósmóðir hevur ljósmøðrafakliga ráðgevandi funktión mótvegis Almenna- og heilsumálaráðnum

Tillagingar
Viðvíkjandi serøkjunum hjá sjúkrarøktarfrøðingunum á Landssjúkrahúsinum, verður skotið upp at um neyðugt, kann hetta virksemi fyrisitingarliga takast úr deildini. Eitt nú kann hetta verða leitt burturav av einum sjúkrarøktarfrøðingi. Ella at hesin partur verður fyrisitingarliga knýttur at medisinska deplinum, har hann náttúrliga hoyrir heima. Ein annar møguleiki er at hesin parturin

verður fluttur av deildini. Hetta er tó ikki nakað, vit beinleiðis vilja mæla til, tí tá missa vit aðrar fyrimunir.

**Viðmerkingar til tilmæli hjá ljósmøðrunum**

*Marin Vang, ið umboðar leiðsluna á Landssjúkrahúsinum* hevur yvirornað tað sjónarmið til hendan spurningin, at arbeiðssetningurin ikki kan fevna um interna leiðslubygnaðin á Landssjúkrahúsinum, ei heldur á hinum báðum sjúkrahúsunum.

Grundgevingin er, at verandi leiðslubygnaður á teimum trimum sjúkrahúsunum, við trimum sjálvstøðugum leiðslum, ikki gevur møguleika fyri at leiða økir uppá tvørs og sostatt er einans møguleiki fyri fakligum samstarvi og ráðgeving.

Marin Vang mælir til, at tað verður endurskoða hvørjar uppgávur kunnu liggja í einum tílíkum starvið eftir at nýggi leiðslubygnaðurin er settur í verk og at tað samstundis verður hugt at lógargrundarlagnum fyri hesum starvi.

Um niðurstøðan er, at tørvur er fyri einum ljósmøðrafakligum samskipara og ráðgeva fyri allar Føroyar, má eitt tílíkt starv antin verða sett uttanfyri Landssjúkrahúsið, ella um uppgávurnar eru avmarkaðar, so kundi hesar verið ein partur av einum ljósmøðrastarvi internt á Landssjúkrahúsinum.

Eisini viðmerkir Marin Vang, at tað enn ikki er tikin endalig støða til um fakligi leiðarin skal verða uttan fyrisitingarligar heimildir. Hetta skal viðgerðast meira nágreiniliga internt á Landssjúkrahúsinum.

*Sólfríða Helmsdal, sjúkrarøktarfrøðingur í bólkinum,* ynskir ikki at gera viðmerkingar til hvussu ljósmøðraskipanin verður organiserð í heilsuverkinum, men ynskir at vísa á týdningin av góðum samstarvi við sjúkrarøktarfrøðingar og aðrar bólkar, soleiðis at dygdir hjá øllum pørtum kunnu brúkast, serliga um trupulleikar koma antin hjá mammu ella barni, soleiðis at hesi allatíðina kunnu verða saman til tey fara heim.

# Hvussu skal ljósmøðraskipanin verða samskipað við aðrar fakbólkar í heilsuverkinum fyri at viðgongu- og burðarskipanin kemur at virka nøktandi og á skynsamasta hátt í Føroyum?

Út frá leiðreglunum og frágreiðingini hjá Heilsustýrinum í Danmark, er tað kommunulæknin, sum er tann fakpersónur, ið kennur kvinnuna best og sum eigur at taka sær av at staðfesta at kvinnan er við barn, ávísa til ljósmóðir, føðistað og møguliga til serlæknakanning. Kommunulæknin tekur sær eisini av samskipanini millum lækna og ljósmóðir.

Ljósmóðurin er er tann fakpersónur, ið kvinnan oftast hevur samband við í viðgongutíðini, og hon er eisini fakligi høvuðspersónurin í sambandi við føðingina.

Tað eru soleiðis bæði kommunulæknin og ljósmóðurin, ið hava ábyrgdina av, at ávísa nøktandi til obstetriskan serlækna og at tryggja at aðrir fakbólkar verða tiknir við eftir tørvi. Millum annað at heilsufrøðiskipanin er kunnað um barnakonuna, við atliti at leggja til rættis vitjan av heilsufrøðingi.

Út frá leiðreglunum og frágreiðingini hjá Heilsustýrinum í Danmark, verður í stóran mun dentur lagdur á at starvsfólkini skulu verða varug við vágar. Arbeiðsbólkurin mælir til, at tað er kommunulæknin ið hevur ábyrgdina av at draga aðrar fakbólkar inn í kanningar- og viðgerðarskeiðið, tá ið mett verður at kvinnan er í vága fyri medisinskum og arbeiðsumhvørvisligum vanda.

Kommunulæknin og ljósmóðurin hava til uppgávu, at draga aðrar fakbólkar eftir tørvi inn í kanningar- og viðgerðarskeiðið, tá ið talan er um ungar kvinnur, einligar og skroypiligar, sosialtyngdar og kvinnur ið hoyra til tjóðarminnilutar.

Tað verður mælt til, at tær ljósmøður ið hava viðtalur, samstarva við ein ella tveir fastar kommunulæknar. Hetta ger seg serliga galdandi í miðstaðarøkinum har tað í løtuni eru átta kommunulæknar og fýra viðtaluljósmøður. Í miðstaðarøkinum kann hetta skipast soleiðis at hvør ljósmóður hevur tveir fastar kommunulæknar, ið hon samstarvar við. Hetta er verið við til at styrkt samskiftið og samstarvið millum hesar fakpersónar.